## ... STJØRNUEYGA

# Stjørnueyga – besti skúladagur



Eftir hvønn leik fingu leikararnir hvør sína reyða rósu. Blaðið Stjørnueyga fekk 16 reyðar rósur. Tá tann seinasta framførslan, sum var dansiteatrið, var liðug, helt Eyð Matras eina røðu og handaði øllum teimum, sum høvdu luttikið á barnasjónleikarastevnuni 2007 hvør sítt diplom.

Blaðbólkurin á sjónleikarastevnuni var 5.a í Sankta Frans skúla í Havn. Blaðstovan var í skúlanum. Skúladagurin byrjaði kl. 10.00 og endaði ikki fyrr enn kl. 21.00, tí Sára skuldi rættlesa tekstirnar, og myndirnar skuldu vera lidnar.

Stjørnueyga er ein hin besti skúladagurin, vit hava havt.

*Næmingar í 5. a í Sankta Frans skúla*
*Louisa Lamhauge og Sigga Vang, lærarar*



# Loyniklubburin

**Dáin. Bólkur frá Dramaverkstaðnum í Havn Loyniklubburin er ein sera spennandi og stuttligur sjónleikur. Leikararnir vóru 10-13 ár.**

Tá leikurin byrjar, er eldur í einum húsum. Til tað brennandi húsið brúktu tey eina roykmaskinu. Fólk síggja royk og begynna at blíva eitt sindur bangin, tí trý hús eru brend upp á tríggjar vikur. Tá tey hava lisið eina grein í Dimmu, gera tey ein loyniklubba, tí tey ætla at finna útav, hvør tað er, sum brennur hús, og tey fóru til blaðið og spurdu, um tey kundu sleppa at tosa við tann, sum tekur bíløtini. Skrivstovudaman svaraði, at hann ikki var har, men tað eyðnaðist loyniklubbanum at finna brennivargin, og tey ringdu beinanvegin 112. Politiið fangaði hann og setti hann í fongsul.

*Guðrið Hentze, Linda Jórun Poulsen og Sissal Abrahamsen*



*Vælnøgdir leikarar eftir sýning*